# Familjan er hornasteinurin í samfelagnum

VINJARD JOHANSEN



Ynskja vit ein fólkavøkstur í Føroyum, mugu vit seta familjuna á dagsskránna.

Vit hava ikki sæð nógv til familjupolitikkin hjá sitandi samgongu. Ynskja vit at gerast fleiri búgvandi í Føroyum, og harvið fáa eina størri arbeiðsmegi, eiga vit at geva tí einstøku familjuni góðar umstøður at liva í okkara landi.

Vit eiga at arbeiða fyri at familjan kann vaksa, uttan at tað skal gerast ein pengarlig forðing.

Fleiri vit eru at bera byrðarnar, lættari er at fáa framgongd í búskapinum og harvið størri arbeiðsmegi.

Hyggja vit eftir fólkatalinum trý tey seinastu árini, síggja vit ikki nakran ítøkiligan vøkstur. Í mai 2007 búðu 48.296 fólk í Føroyum, og er tað ein vøkstur við bert 93 fólkum.

Greitt er, at vilja vit verða 80.000 fólk um 20 ár, má okkurt meira ítøkiligt gerast, so familjan fær betri møguleikar at liva her heima.

Vit skulu sjálvandi eisini gera tað møguligt hjá fólki at flyta til Føroyar, men vit mugu fyrst og fremst hugsa um tey, ið longu eru búgvandi her.

Vit eiga t. d. at gera tað møguligt fyri familjuna at konan ella maðurin kann vera heima í eitt ár við fullum rætti at fáa barsilspening alt árið, at fáa duppultan barnafrádrátt, tá ið triðja barnið kemur, og at lætta um við flutningi, sum Miðflokkurin fyrr hevur skotið upp. Møguleiki skal vera fyri at keypa ein familjubil býligari, sum er bæði tryggari og lættari, hjá einari familju at nýta.

Við tí politikki, sitandi samgonga setur á dagskránna, verður ikki hugsað nógv um familjuna, men ivamál er ikki í, at vit fara at hoyra somu samgonguflokkar lova familjuni bæði gull og grønar skógir, nú tað fer at stunda móti einum nýggjum løgtingsvali.

Sum gongdin er nú, er ikki møguligt fyri meira enn einum ávísum vøkstri, tí vit hava ikki nokk av arbeiðsmegi.

Miðflokkurin hevur ta áskoðan, at familjan er hornasteinurin í samfelagnum og setur tí altíð familjuna á dagsskránna. Tíðin er nú komin til eitt vaktarskifti, so at hetta kann setast í verk.

# Tak kókið av grýtuni, Tórshavnar kommuna!

ANNFINN BREKKSTEIN



Fíggjarætlanin hjá Tórshavnar kommunu ber brá av respektleysum fíggjarpolitikki og vantandi tálmning av rakstarútreiðslum.

Tað er púra burturvið at økja rakstarútreiðslurnar við 40 millónum krónum og íløgurnar næstan tað tvífalda – og so enntá at brúka av innistandandi í so góðum tíðum. Tað vísir seg, at borgarstjórin og samgongan trúgva, at trøini vaksa inn í himmalin. Hetta er respektleyst og eitt klassiskt dømi um, at býráðsmeirilutin hevur mist tamarhaldið á kommunubúskapinum.

Tað prógvar í øllum førum henda fíggjarætlanin, sum fer at leggja enn størri trýst á fyrisitingina, sum frammanundan er undir ivaleysa stórum trýsti, tí virksemið í kommununi jú er so stórt.

Tá tú ert valdur til at umsita skattaborgarans pening, er neyðugt at vísa virðing og respekt, men her er býráðsmeirilutin við Javnaðarflokkinum og Tjóðveldinum tvørturímóti farin at reka hasarderaðan fíggjarpolitikk, ið nóg illa tolir at bera heitið fíggjarpolitikkur. Her er virðingin og respektin fyri skattaborgaranum sett fullkomuliga til víks.

Tað er ábyrgdarleyst at brúka av innistandandi í so góðum tíðum, samstundis sum hetta er eitt tekin um sjúkan fíggjarpolitikk, har raðfesting, tolsemi og politiskar visjónir als ikki eru til staðar. Alt hetta verður ofra, tí alt skal henda her og nú – kosta, hvat tað kosta vil!

# Bíblian aftur fyri hørðum ágangi

RICHARD DANIELSEN



Tað sum nú verður funnist at, er dómarnir,sum bíblian talar um. Okkurt verður tikið fram,og sagt verður at tað kann ikki vera orð Guds, Sagt verður at nógv gott er í bibliuni, men slíkt kann ikki vera frá Gudi.

Fara vit at taka alt burtur í bíbliuni, sum handlar um dóm Guds yvir gudloysi, verður ikki nógv eftir, tað veit ein og hvør, sum kennir sína bíbliu. Jú vissuliga er øll bíblian frá Gudi og ikki bert partar av henni. Vit mugu góðtaka alt, sum skrivað stendur. Eisini tað sum vit helst vildu sloppi frá at góðtaka, tí tað tykist so ræðuligt at hugsa um, sum menniskja. Gud er so langt omanfyri okkum, vit mugu ikki ditta okkum til at seta hann uppá pláss. Hann hevur opinbera seg so týðuliga fyri okkum menniskjum gjøgnum sína tigandi talu, skapanarverkið, og gjøgnum sítt innblásta orð , skriftirnar. Har talar hann ,við profetum sínum í gamla testamenti og ápostlum sínum í nýggja testamenti, til okkum menniskju. Har sigur hann okkum, hvussu heilagur hann er, har kunngerð hann sínar ræðuligu dómar, fyri at fá menniskja at venda við, men har hevur hann eisini sagt okkum frá tí frelsu, sum hann gevur óforskilt fyri einki, til ein og hvønn, sum tekur við henni. Tá ið vit hugsa um teir ræðuligu dómar, sum bíblian sigur frá, eigur tað at venda tonkum okkara til líðingar Kristusar, teir ræðuleikar, sum Jesus Kristus mátti ígjøgnum júst fyri at bjarga okkum undan dómi Guds.

Jú dómarnir, sum vit lesa um í bíbliuni komu yvir menniskju fyri syndir sum vóru gjørdar, og teir dómar, sum bíða hesum heimi fara vissuliga at koma, soleiðis sum skriftirnar siga okkum.

Viðhvørt verður sagt um menniskju, at tey eru so dømandi. Víst verður á Jesus, sum elskaði og hevur sagt, at vit skulu elska osf.. Men eingin hevur tosa meiri álvarsligt um dóm enn nettup Jesus. Tað er eisini Jesus sjálvur ,sum sigur, at eins og tað var á døgum Nóa og Lots, soleiðis skal verða á døgum menniskjasonarins. Lat okkum ikki gloyma hatta. Tað stendur ein øðiligur dómur fyri framman. Europa sleppir ikki undan. Einasta vón fyri okkum er at venda við og trúgva á Jesus til fyrigeving syndana. Hjá honum eru vit trygg, nýtast ikki at óttast fyri tí,sum kemur yvir henda heim. Jesus sigur tað soleiðis, tá ið hann talar um endatíðina: "Men tá ið tit hoyra um hernaðir og frætta hernaðartíðindi, tá latið tykkum ikki ræða! Tí so má verða. Markus 13,7.

Tí er umráðandi at flýggja til Kristus, ongantíð ov skjótt. Hann gav sítt lív fyri at bjarga okkum undan dóminum.

# Barnafilmar á føroyskum ítøkiligt stig nærri veruleikanum

**Peningur er nú settur av á fíggjarlógini til at fara í gongd við at føroyska eitt úrval av væl umtóktu barnafilmunum, ið annars verða keyptir í hvørjari sølubúð á útlendskum máli. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur tikið áheitan mína til eftirtektar, um at taka hetta neyðuga stig til at styrkja um málsligu styrkina og harvið lesiførleikan hjá okkara smæstu**

JOHN JOHANNESSEN
løgtingslimur



Vit foreldur kenna øll støðuna. Hetta við teimum trimum valmøguleikanum á sjónvarpsskíggjanum. Skulu vit velja danskt, enskt ella kanska íslendskt mál, tá vit loyva okkara smáu børnum at síggja ein annars frálíkan barnafilm, ið vit júst hava keypt sum ítskoyti til tær mongu frálíku barnabøkurnar, ið tíbetur eru á føroyskum.

Ongin av hesum valmøguleikum er tann rætti. Tvørturímóti kunnu teir avlaga málførleikan. Og vit síggja tað enntá javnan, at børnini velja eitt fremmandamál framm um móðurmálið, tá tey spæla saman.

**Játtan sett á fíggjarlógina**
Vón er tó fyri framman. Tí í góðum samstarvi við landsstýrismannin í mentamálum hevur nú eydnast at skapt møguleika fyri at fáa flutt nakað av fjølbroytta og góða margmiðlatilfarinum til tey smæstu yvir í føroyskt mál.

Enn er upphæddin til hetta arbeiðið ikki tann heilt stóra. Men 400 túsund krónur á fíggjarlógini fyri 2008 eru í øllum førum ein byrjan, tá vit hugsa um, at vit í hesum føri byrja frá ongum.

**PISA og førleiki**
Nógv umrødda PISA kanningin staðfesti, at næmingarnir í føroyska fólkaskúlanum hava ilt við at lesa ein tekst og at skilja innihaldið í tekstinum. Hetta er ein rættiliga álvarsamur trupulleiki, ið vit øll áhaldandi eiga at leggja nógva orku í at basa.

Eftir tilmæli frá Lærarafelagnum og Mentamálaráðnum hava vit longu tikið fleiri ítøkilig stig. Peningur er játtaður til hægri tímatal í fólkaskúlanum, serliga til teir yngstu næmingarnar. Hetta við teirri grundgeving, at serkøna ráðgevingin hevur staðfest, at grundleggjandi førleikarnir verða best mentir meðan børnini eru heilt ung.

Serfrøðin hevur eisini mælt til at styrkja munandi um undirvísingartilfar á føroyskum máli til allar lærugreinir í fólkaskúlanum. Hesum hava vit tikið ítøkilig stig fyri við at hækka játtanina til Skúlabókagrunnin og harvið vónandi til føroyskar skúlabøkur.

**Roykja á føroyskum og lurta á donskum**
Áðurnevndu tiltøk eru øll bæði skilagóð og neyðug. Men eg eri sannførdur um, at skulu vit veruliga taka tøk fyri lesiførleikanum, skulu vit eisini náa børnunum, ið enn ikki eru farin í skúla. Tí er avgerandi neyðugt at fáa flutt ein tann besta partin av frálíka útlendska margmiðlatilfarinum yvir í føroyskt til tey smæstu.

Hví var tað á sinni avgerandi neyðugt at fáa umsett donsku ávaringarnar á tubbakspakkunum um "kræft" og "blodprop" til føroyskt fyri føroyska roykjaran, meðan vit framhaldandi skulu góðtaka, at okkara smáu børn uppliva ævintýrheimin og filmsverðina ígjøgnum danskt, enskt ella íslendskt mál?

**Vaksa um dýrgripin**
Filmur og margmiðlatilfar annars eru umframt bøkurnar við til at menna børn, um vit halda okkum frá bara at nýta tað sum barnagentu. Vit hava tíbetur barnasendingar á føroyskum bæði í útvarpi og sjónvarpi. Harumframt syrgja dugnaligir sjónleikarar og umsetarar fyri, at ein partur av útlendska barnatilfarinum verður umsett og sent í sjónvarpinum.

Hetta er kortini ov lítið, og tilfarið er bert atkomiligt ávísar klokkutíðir, tá Kringvarpið velur at senda tað.

Tí er tað ein politiskur sigur, at tað nú á fyrsta sinni er eydnast at seta pening av – hóast avmarkaða mongd – at fáa umsett part av modernaða barnatilfarinum og fáa tað givið út, so at børnini ikki bert renna seg í útlendskt tilfar á bókasavninum, bensinstøðini og matvøruhandlinum.

Við hesum sleppa vit vónandi við tíðini undan, at ein partur av spælinum hjá børnunum gongur fyri seg á fremmandum máli. Vit fáa vónandi styrkt lesiførleikan og móðirmálið. Og harumframt fáa vit stuðlað dugnaligu føroysku sjónleikarunum fíggjarliga, við at lata teimum hesa uppgávu.

Dysturin nú er at virka fyri, at upphæddin veksur frá teimum 400 túsund krónunum upp á eitt nøktandi støði. Tað fari eg at leggja stóra orku í, um veljarin vísir mær álit at halda fram eitt valskeið afturat.